# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2013

Ein lýsing av fiskivinnuni og virkseminum hjá felagnum

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Samandráttur og frágreiðing frá nevndini

Í 2013 vóru lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum 286 mió. kr. í mun til 304 mió kr. í 2012. Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum í 2013 var uml. í 5,8 mia. kr., í mun til uml. 5 mia. kr. í 2012. Eisini í nøgd vaks útflutningurin av fiskavørum , so nøgdin í 2013 var uml. 393 tús. tons.

Gongdin í feskfiskaveiðuni er tó framvegis negativ, og minkaði aftur í 2013, úr 82 tús. tons í 2012 niður í 73 tús. tons 2012. Hetta er á sama støði sum kreppuárið 1993. Støðan í heimaflotanum er vánalig, og eingi serlig tekin eru um nakran bata.

Flakavinnan á landi hevur seinnu árini haft batnandi ársúrlit, men tað er serliga orsakað av lægri rentuútreiðslum og minkandi avskrivingum. Gongdin í EBITDA hevur ikki verið líka positiv, men hevur at kalla staðið í stað.

Ymisk mál hava merkt virksemið hjá felagnum farna árið:

*Marknaðaratgongd*

Felagið hevur nú í eina tíð roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku uppá at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd á nýggjum vakstrarmarknaðum, serliga í Suðuramerika og í Asia. Hetta er ikki eitt arbeiði, sum verður liðugt eftir einum ári. Serliga hjá einum lítlum landi sum Føroyar, krevur tað eitt áhaldandi arbeiði frá myndugleikunum at sannføra myndugleikarnar í einum landi um at nýta orku uppá handils- og heilsufrøðiligar avtalur við Føroyar.

Royndirnar vísa, at tað tekur langa tíð at lata upp marknaðirnar fyri føroyskar fiskavørur. Tað er tí ov seint at taka samband við myndugleikarnar í hesum londum, tá trupulleikar eru á ES-marknaðinum. Tað er neyðugt at arbeiða við at opna so nógvar av teimum áhugaverdu marknaðunum fyri føroyskar fiskavørur, so tað ber til at selja onnur støð, tá umstøðurnar á einum marknaði gerast truplar.

Landið setur tó ikki nógva orku av til at gera handilssáttmálar og til at fáa í lag heilsufrøðiligar avtalur.

Eftir áheitan frá felagnum lat Løgtingið í 2013 Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eina játtan á 500 tús. kr., sum skuldi nýtast til at fáa marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur á

nýggjum marknaðum, herundir Brasil. Staðfestast má tó, at lítið kom burturúr hesum peningi í so máta.

Útlfutningsforum er sett á stovn, har umboð fyri Løgmansskrivstovuna, Vinnumálaráðið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, og Ráfiskakeyparafelagið javnan hittast at viðgera spurningar í mun til útflutning, serliga uttanfyri ES. Men ein fortreyt fyri at nakað skal henda á hesum øki er, at myndugleikarnir raðfesta starvsfólkaorku at arbeiða við marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur. Annars verður tað torført at fáa nakað at henda á hesum øki.

*Avtøka av uppboðssølukravinum*

Felagið hevur seinastu 2-3 árini í fleri umførum heitt á Fiskimálaráðið um at avtaka uppboðssølukravið fyri óvirkaðan fisk.

Fiskimálaráðið hevur í kunngerð fyribils strikað uppboðssølukravið fram til 1. September 2014. Um hetta skal halda fram aftaná 1. september, skal kunngerðin tískil broytast.

*Útflutningur av saltfiski til ES*

Í farna ári samtykti ES-skipanini loksins uppskotið um at loyva fosfat í saltfiskaframleiðsluni til ES, hóast stóra mótstøðu úr Portugal. Portugal royndi í síðstu løtu at fáa ásett serlig merkingarkrøv í uppskotið, men hetta vóru limalondini ímóti, tí hildið varð, at krøvini í vanligu merkingarkunngerðini vóru nøktandi. Á heysti 2013 varð kunngerðin lýst, og frá 1. Januar 2014 kundu saltfiskaframleiðarar so aftur útflyta saltfisk sum vant.

Sera gott samstarv var millum Ráfiskakeyparafelagið og samstarvsfeløgum í Íslandi, Danmark og Noregi um hetta málið eins og við sendistovunarnar í Brussel.

*Samskipan av ESE*

Løgmansskrivstovan boðaði í juli 2013 frá, at hon ikki ætlaði at samskipa føroyska landabásin á fiskivinnumessuni í Brussel í 2014. Ráfiskakeyparafelagið átók sær tí saman við øðrum feløgum í húsinum at samskipa messuluttøkuna í 2014. Orsakað av stutta skotbránum varð avgjørt, at Føroya Arbeiðsgevarafelag formliga skuldi standa fyri básinum í 2014. Avtala varð gjørd við Uttanríkisráðið um stuðul á 600 tús. kr. til messuluttøkuna í 2014. Eingin avtala er gjørd um 2015.

Gerð av básinum varð bjóðað út, og sáttmáli varð gjørdur við Sansir um hetta.

Um feløgini í Vinnuhúsinum framvegis skulu samskipa tiltakið í komandi árum, verður helst neyðugt at skipa hetta øðrvísi í 2015.

*Marknaðarføring av føroyskum fiski*

Ráfiskakeyparafelagið fær javnan fyrispurningar frá fiskakeyparum kring heimin um at koma í samband við føroyskar fiskaútflytarar. Felagið sendir teimum síðani ein teldupost við kontaktupplýsingum til limirnar í felagnum, so teir kunnu seta seg beinleiðis í samband við fyritøkurnar.

Lutfalsliga høga talið av fyrispurningum er helst ein ábending um, at tað ikki er so lætt at finna føroyskar fiskaútflytarar á netinum. Í øllum førum er einki samlað yvirlit yvir útflytararnar á enskum máli. Arbeitt hevur tí verið við at fyrireika eina heimasíðu, sum skal lýsa føroyskan fisk og har keyparar kunnu finna eitt yvirlit yvir føroyskar fiskaútflytarar. Hetta kundi verið eitt fyrsta stig í at styrkja um marknaðarføringina av føroyskar fiskavørum og –útflytarum. Neyðugt er tó við fígging, um verkætlanin skal gerast veruleiki.

*Mál í Fiskivinnuráðnum og Løgtinginum*

Felagið hevur í farna ári gjørt sína ávirkan galdandi gjøgnum sína luttøku í Fiskivinnuráðnum. Fiskivinnuráðið viðger alla nýggja lóggávu umframt broytingar í verandi lóggávu innan fiskivinnuøkið.

Tá mál eru fyri í Løgtinginum, sum hava týdning fyri limirnar, fær felagið oftast málini til ummælis, og felagið verður eisini biðið um at møta á nevndarfundum í sambandi við viðgerð av málunum.

# Innihald

**INNGANGUR ... 4**

*Føroya Ráfiskakeyparafelag ... 4*

**UM FISKI- OG FLAKAVINNUNA ... 5**

LØNARÚTGJALDINGAR Í FISKIVINNUNI ... 5
ÚTFLUTNINGURIN ... 6
RÁVØRUTILGONGDIN TIL VINNUNA ... 8
MIÐAL AVREIÐINGARPRÍSIR ... 9
ÚTFLUTNINGUR AV HEILUM KØLDUM FISKI ... 10
AVREIÐINGAR UTTANLANDS ... 10
FLAKAVINNAN ... 11
VEIÐULIÐIÐ ... 12
ÚTLITINI FYRI FISKISKAPIN UNDIR FØROYUM ... 13

**VIRKSEMI FELAGSINS Í FARNA ÁRI ... 14**

MARKNAÐARA TGONGD ... 14
AVTØKA AV UPPBOÐSSØLUKRAVINUM ... 15
ÚTFLUTNINGUR AV SALTFISKI TIL ES ... 15
SAMSKIPAN AV ESE ... 16
MARKNAÐARFØRING AV FØROYSKUM FISKI ... 16
MÁL Í FISKIVINNURÁÐNUM ... 16
MÁL Í LØGTINGINUM ... 17

**SKJAL 1: FISKAVØRUÚTFLUTNINGUR Í 2012 OG 2013 ... 18**

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing er løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 29. apríl 2014. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiski- og flakavinnuni og virksemi felagsins.

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Regin Mikkelsen, formaður

Jógvan Gregersen, næstformaður

Fríðin Ziskason

Jens Pauli Petersen

Marnar Pattinson

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru pr. 20. apríl 2013:

| | |
|---|---|
| Delta Seafood | Sandoy Seafood P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Nevið P/F |
| Scrabster Seafood | Faroe Origin P/F |
| Tavan Sp/f | Kósin P/F |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | FoFish Sp/f |
| Vestmanna Seafood | |

# Um fiski- og flakavinnuna

## Lønarútgjaldingar í fiskivinnuni

Um hugt verður eftir lønarútgjaldingum í fiskiskapi og fiskaframleiðslu frá 2007 til 2013 sæst at tær sum heild eru minkandi. Í 2007 vóru lønarútgjaldingarnar hjá fiskavirkjunum umleið 350 mió. kr, meðan tær í 2013 vóru uml. 285 mió kr., hóast stórar nøgdir av pelagiskum komu upp á land í fjør. Og tá er hædd ikki tikin fyri tann lønar- og prísvøkstur, sum hevur verið í hesum tíðarskeiði. Um virksemið varð óbroytt, áttu lønargjaldingarnar at verið øktar, tí sáttmálalønirnar eru øktar í sama tíðarskeiði.

Fyri veiðuliðið sæst, at lønarútgjaldingarnar, sum í 2007 táttaðu í milliardina, síðani eru minkaðar í stórum, men hava so seinastu 4 árini stabiliserað seg um 700-800 mió kr. um árið.

Um hugt verður eftir veiði- og framleiðsluliðnum undir einum, hava løngjaldingarnar seinastu 3 árini ligið omanfyri eina milliard kr. um árið. Fiskivinnan er tó grundarlag undir fleiri lønargjaldingum, bæði til undirveitarar og til fólk, sum arbeiða longri frammi í virðisketuni. M.a. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar og viðlíkahald.

| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 951.947 | 724.205 | 576.131 | 714.181 | 783.008 | 772.116 | 764.862 |
| Fiskavøru-ídnaður | 349.730 | 314.920 | 302.561 | 313.903 | 257.229 | 304.138 | 285.535 |
| Tilsamans | 1.301.677 | 1.039.125 | 878.692 | 1.028.084 | 1.040.237 | 1076.254 | 1.050.397 |

## Útflutningurin

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í mynd 1. Gev gætur, at talan er um allar fiskavørur, eisini frá alivinnuni. Í nøgd er samlaði útflutningurin í 2013 gjørdur upp til umleið 393.000 tons, sum er hægri enn í 2012 tá útflutningurin var uml. 356.000 tons. Tað er serliga ein økt nøgd av sild og lýsi, sum er orsøk til økta tonsatalið. Útflutningsvirðið fyri samlaða fiskaútflutningin í 2013 hækkaði eisini í mun til 2012, og lutfalsliga øktist útfutningsvirðið meira enn tonsatalið. Samlaða útflutningsvirðið av fiskavørum er nú uml. 5,8 milliardir krónur.




*Mynd 1. Útflutningur av fiskavørum: Nøgd og virði frá 2007 til 2013. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í skjali 1, sum sæst aftast í hesari frágreiðing, er eitt útgreinað yvirlit yvir útflutningsnøgd og –virði fyri flestu fiskasløg.

Tað er sermerkt, at samstundis sum nøgdin á fiskaútflutninginum er økt við 33% frá 2009 til 2013, eru lønargjaldingarnar í fiskaframleiðsluni minkaðar við 6 % í sama tíðarskeiði. Ein partur av frágreiðingini er helst, at eitt tons av uppisjóarfiski ikki kastar líka nógvar lønarkrónur av sær, sum eitt tons av botnfiski.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var tilsamans eitt vet lægri í 2013 samanborið við 2012. Tað var nøgdin av upsaflaki sum var orsøkin til minkingina, tí flak av øðrum fiskasløgum hækkaðu nakað, hóast tey framvegis eru á einum sera lágum støði.

Útflutningsvirðið av hesum vørum minkaði meira enn nøgdin. Flaktur toskur og hýsa fingu ein betri prís pr. kg, meðan hýsa og onnur fiskasløg fingu verri prís. Í miðal var talan um eina minking í miðalprísinum.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur/kg. | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2012 | 2013 | 2012 | 2013 | 2012 | 2013 |
| **Flak, fryst og kølt** | | | | | | |
| Toskur | 6.633 | 7.219 | 227.151 | 263.010 | 34,24 | 36,43 |
| Hýsa | 553 | 671 | 14.603 | 21.407 | 26,41 | 31,92 |
| Upsi | 12.420 | 10.659 | 356.775 | 267.670 | 28,73 | 25,11 |
| Onnur fiskasløg | 979 | 1.236 | 41.912 | 34.796 | 42,83 | 28,15 |
| **Tilsamans** | **20.585** | **19.785** | **640.440** | **586.884** | **31,11** | **29,66** |
| **Saltfiskur, flaktur og flak** | | | | | | |
| Toskur | 4.156 | 5.090 | 170.870 | 184.499 | 41,11 | 36,25 |
| Hýsa | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00 | 0,00 |
| Upsi | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00 | 0,00 |
| Onnur fiskasløg | 5.877 | 5.315 | 174.799 | 144.252 | 29,74 | 27,14 |
| **Tilsamans** | **10.033** | **10.405** | **345.670** | **328.750** | **34,45** | **31,60** |
| **Heilur fiskur, frystur og køldur** | | | | | | |
| Toskur | 1.415 | 2.587 | 29.301 | 42.254 | 20,70 | 16,34 |
| Hýsa | 2.086 | 2.571 | 32.946 | 42.038 | 15,79 | 16,35 |
| Upsi | 396 | 374 | 6.523 | 5.450 | 16,49 | 14,58 |
| Onnur fiskasløg | 18.866 | 27.763 | 261.109 | 270.619 | 13,84 | 9,75 |
| **Tilsamans** | **22.763** | **33.294** | **329.880** | **360.362** | **14,49** | **10,82** |

*Mynd 2. Útflutningur í nøgd og virði, býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa 2012 og 2013 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Nøgdirnar av útfluttum saltfiski øktust nakað í 2013 í mun til 2012, tó at nøgdin í 2012 var sera lág í mun til árið frammanundan. Nøgdin á saltfiski úr toski øktist, meðan nøgdin av saltfiski úr øðrum fiski minkaði nakað. Framvegis varð eingin saltfiskur úr upsa ella hýsu útfluttur í 2013. Miðalprísurin fyri saltfiskin var nakað lægri í 2013, og hevur hetta helst fleiri orsøkir, bæði í mun til rávøru og trupulleikar í s.v. reglurnar fyri framleiðslu til ES.

Samlaða útflutningsvirðið av saltfiski er soleiðis lækkað við uml. 27 mió kr. í 2013 í mun til 2011.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski øktust nakað í 2013. Tað vóru tó serliga onnur fiskasløg enn toskur, hýsa og upsi, sum í størri mun vóru útflytt óvirkað av landinum. Samlaða virðið av óvirkaðum fiski øktist við uml. 30 mió kr. Virðið er eisini minkað munandi, einamest tí størri partur av útflutninginum var onnur fiskasløg, og at hesi fingu ein verri miðalprís.

## Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2013 aftur minkaði í mun til árið fyri. Samanlagt er feskfiskaveiðan síðan 2010 minkað við uml. einum triðingi. Um hugt verður eftir vanligu botnfisksløgunum[1], er lutfalisga minkingin uppaftur størri. Nakað meira av toski og hýsu kom upp á land í 2013 í mun til 2012, men toskur og hýsa eru framvegis stak illa fyri, og er fiskiskapurin eftir hesum fiskasløgum bert ein viðfáningur av, hvat hann var fyri nøkrum árum síðani. Nøgdin av upsa minkaði við uml. 8.000 tonsum, og er veiðan nú minni enn helvtina av tí, sum varð veitt av upsa í 2009. Nøgdin á flatfiski minkaði eisini nakað í 2013.

Avreiðingarvirðið á feskum fiski var 630 mió. kr. í 2013 ímóti 774 mió. kr. í 2012. Hyggja vit longur aftur, kunnu vit síggja, at avreiðingarvirðið í í 2006 var 1,25 mia. kr. Hetta merkir, at avreiðingarvirðið á feskfiski í 2013 bert var helvtina av tí tað var í 2006.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2012** | **2013** | **2012** | **2013** | **2012** | **2013** |
| **Toskur** | 8.556 | 9.857 | 127.813 | 123.790 | 14,94 | 12,56 |
| **Hýsa** | 2.613 | 3.209 | 30.012 | 37.333 | 11,49 | 11,63 |
| **Upsi** | 32.376 | 24.562 | 287.316 | 194.572 | 8,87 | 7,92 |
| **Annar botnfiskur** | 178 | 106 | 1.802 | 856 | 10,15 | 8,11 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.546 | 4.012 | 112.933 | 99.894 | 24,84 | 24,90 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 13.781 | 16.184 | 64.191 | 76.692 | 4,66 | 4,74 |
| **Veiðan tilsamans** | 82.253 | 72.630 | 773.762 | 630.012 | 9,41 | 8,67 |

*Mynd 3. Feskfiskaveiða: Nøgd, virði og miðalprísur í 2012 og 2013 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í 2010 tók toskafiskiskapurin fyri fyrstu ferð í 8 ár seg eitt sindur uppaftur, men minkaði so aftur í 2011 og 2012. Í 2013 varð so aftur ein lítil framgongd á góð 1.000 tons.

Eftir at fiskiskapurin eftir hýsu í árunum frammanundan var minkaður í sjey ár á rað, var í 2013 ein lítil framgongd at hóma. Tó skal havast í huga, at veiðinøgdin í 2003 var umleið 24.600 tons, meðan hon í 2013 bert var uml. 3.200 tons. Veiðan av hýsu er tí framvegis bert er ein viðfáningur av veiðini fyri nøkrum árum síðani.

[1] Toskur, hýsa, brosma, longa, upsi, hvítingur, kongafiskur, steinbítur, blálonga

Upsafiskiskapurin, sum hevði verið javnt góður í fleiri ár, minkaði bæði í 2010 og 2011 við umleið 13.000 tonsum hvørt árið, øktist so aftur øktur við uml. 5.000 tonsum í 2012, men í 2013 minkaði hann so aftur við 8.000 tonsum. Samanumtikið hevur tí verið ein stór minking í veiðini hesi seinnu árini.

Umframt at nøgdin sum heild er minkað, er miðal avreiðingarprísurin pr. kg. eisini minkaður. Sum tað sæst í talvuni omanfyri, eru flestu avreiðingarprísir lækkaðir í 2013 í mun til 2012.

## Miðal avreiðingarprísir

Í Mynd 4 fæst ein greiðari mynd av gongdini í miðal avreiðingarprísunum á toski, hýsu og upsa frá 2006 til 2012. Myndin vísir, at miðalprísurin fyri tosk er lækkaður seinastu árini. Hýsuprísurin er meira støðugur, meðan upsaprísurin sum heild er øktur hesi seinastu árini, hóast ein minking í 2013. Gongdin hevur haft við sær, at munurin millum avreiðingarprísunum á hesum fiskasløgum er vorðin nógv minni. Eftir at miðal avreiðingarprísurin á toski í 2007 var nærum tað fimmfalda av upsaprísinum, var toskaprísurin í 2013 bert hálvaaðru ferðir upsaprísin. Somuleiðis var prísmunurin millum hýsu og tosk í 2007 millum 9 og10 kr., meðan hann í 2013 bert var hálva krónu.




*Mynd 4. Miðalprísir á toski, hýsu og upsa frá 2006-2013 (Kelda: Hagstova Føroya)*

## Útflutningur av heilum køldum fiski

Síðani ógvusligu hækkingina í tíðarskeiðnum frá 2000 til 2003 hevur útflutningurin av heilum køldum fiski verið javnt minkandi, og er nú, hóast ein lítla hækking í 2013, framvegis á einum lágum støði.




| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 4.486 | 10.18 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.676 | 1.884 | 1.725 | 2.201 | 3.284 | 2.222 | 1.190 | 1.234 |
| Hýsa | 6.445 | 13.18 | 14.42 | 12.10 | 10.57 | 9.506 | 7.052 | 4.366 | 3.752 | 3.917 | 2.831 | 1.843 | 2.379 |
| Upsi | 5.210 | 11.26 | 13.20 | 9.374 | 11.87 | 4.214 | 3.932 | 1.574 | 3.348 | 1.528 | 1.126 | 396 | 374 |

*Mynd 5. Útflutningur av heilum køldum fisk frá 2001-2013 (Kelda:Hagstova Føroya).*

Samlaða nøgdin av toski, hýsu og upsa, sum fór óvirkað av landinum, var í 2013 knapt 4.000 tons í mun til góð 3.000 tons í 2012.

## Avreiðingar uttanlands

Mynd 6 vísir gongdina í avreiðingum uttanlands. Tað sæst, at eftir eina lækking í 2012, vuksu nøgdirnar aftur nakað í 2012. Nøgdirnar eru tó framvegis millum tær lægstu í hesari øldini. Tað var serliga ein vøkstur í nøgdini av toski sum var orsøk til samlaða vøksturin.




*Mynd 6. Landingar uttanlands 2001-2013 (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Samlaða nøgdin avreidd uttanlands í 2013 var uml. 13.000 tons í mun til góð 5.000 tons í 2012, sum tó var søguliga lág nøgd.

## Flakavinnan

Samlað sæð hava seinastu nógvu árini verið avbjóðandi hjá føroysku flakavinnuni. Fallandi rávørunøgdir og óstøðug marknaðarviðurskifti hava verið høvuðsatvoldin til stóru avbjóðingarnar.

Hóast umstøðurnar eru sera avbjóðandi í løtuni, eru tað tó einstøk virki sum klára seg hampuliga væl. Eyðkennið við flestu av hesum virkjunum er sera lítil skuld og góð tillagingarevni í mun til minkandi rávørugrundarlag. Samanumtikið er avkastið í vinnuni tó framvegis alt ov lítið.

### Búskaparlig úrslit flakavinnan

| Mió. kr. | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 1.578 | 1.520 | 1.404 | 1.470 | 1.197 |
| EBITDA | 51 | 60 | 86 | 72 | 73 |
| EBIT | 5 | 12 | 40 | 27 | 51 |
| Úrslit áðr. óvanl. | -132 | -98 | -17 | -15 | 29 |
| **Ársúrslit** | **-139** | **-102** | **-10** | **-22** | **17** |

*Mynd 7: Samlaða úrslitið hjá vinnugreinini fiskavirki (flaka- og saltfiskavirki v.m.). Mió. kr.*

Í mynd 7 síggjast búskapartøl hjá flakavinnuni (flaka- og saltfiskavirki) í tíðarskeiðnum 2007-11. Nýggjari hagtøl finnast tíverri ikki enn. Sum heild er framgongd í samlaða ársúrslitinum hjá flakavirkjunum, men um hugt verður eftir gongdini í úrslitinum áðrenn

avskrivingar, rentur og skatt, broytist úrslitið ikki stórvegis frá ári til ár. Orsøkin til betraða ársúrlitið skal tí í størri mun finnast í minkandi avskrivingum og serliga í rentukostnaðinum. Tí kann orsøkin til betraða ársúrslitið partvíst vera eitt broytt fíggingarmynstur.

Fyri nøkrum árum síðani høvdu virkini sera trupult við at fáa arbeiðsmegi til virkini. Hetta er tó ikki ein stórur trupulleiki í løtuni, og er hetta til frama fyri vinnugreinina sum heild. Í mun til restina av Evropa er arbeiðsloysið í Føroyum lágt, og ein øking av virkseminum í búskapinum kann tí føra til fløskuhálsar, so flakavirkini aftur fáa trupulleikar við at fáa arbeiðsmegi. Føroysk virki eiga tí framvegis at fáa møguleikan frítt at seta eisini útlendsk starvsfólk, tá tað er neyðugt.

Í løtuni eru tað tó aðrar avbjóðingar sum minkandi rávørutilgongd og minkandi eftirspurningur og keypiorka á høvuðsmarknaðunum, sum eru fremstu vandamálini. Tað er tí alneyðugt, at okkara myndugleikar bera so í bandi, at teir tryggja virkjunum møguleikar at kunna selja fiskin á teimum marknaðum, sum eru vaksandi, eitt nú í Suðuramerika og Asia. Bert við góðari marknaðaratgongd kann tað tryggjast, at fyritøkurnar fáa besta prísin fyri fiskin, samfelagnum at gagni.

## Veiðuliðið

Sum tað eisini er greitt frá frammanfyri, var samlaða feskfiskaveiðan í 2013 umleið 73.000 tons, sum er tað lægsta í hesari øldini, og á leið tað sama sum í kreppuárinum 1993. Verður hugt eftir einstøku skipabólkunum sæst, at serliga trol og lína hava haft afturgongd, meðan garnaskipini hava haft framgongd. Snellufiskiskapurin stendur at kalla í stað.

| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lemmatrol** | 32.503 | 21.840 | 20.235 | 17.882 | 10.985 | 8.941 | 6.525 |
| **Partrol** | 57.238 | 63.344 | 65.179 | 57.582 | 49.346 | 46.819 | 40.732 |
| **Lína** | 26.257 | 21.787 | 19.658 | 23.688 | 20.549 | 19.491 | 16.291 |
| **Snella** | 2.028 | 1.853 | 3.776 | 3.857 | 2.929 | 2.091 | 2.146 |
| **Gørn og annað** | 3.019 | 2.986 | 2.596 | 2.980 | 1.296 | 4.910 | 6.936 |
| **Reiðskapur tilsamans** | 121.045 | 111.809 | 111.444 | 105.987 | 85.105 | 82.253 | 72.630 |

*Mynd 8. Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2007-2013 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)*

Føroyski heimaflotin hevur havt sera stórar avbjóðingar seinastu árini, og støðan bara versnar. Minkandi fiskiskapur og lágir prísir hava merkt vinnuna.

## Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2013/2014 skrivaði Havstovan um toskastovnin á landgrunninum, at gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2005. Hóast ein lítil vøkstur er hann er nær minsta markinum fyri, hvat er ráðiligt. ICES hevur í sínum tilmæli mælt til, at veiðitrýstið verður minkað við 69%. Eingin ivi er sostatt um, at toskastovnurin er illa fyri.

Havstovan skrivar eisini, at toskurin á Føroyabanka framvegis er illa fyri og hóast ábending um lítlan bata, mælir Havstovan framvegis til, at eingin toskafiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka.

Hýsustovnurin er eisini sera illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hýsustovnurin hevur síðani 2010 verið undir markinum fyri, hvat er ráðiligt, og gýtingarstovnurin hevur ongantíð verið so lítil sum nú. Sjálvt við ongari veiðu fer hann at halda seg undir minstamarkinum.

Upsastovnurin verður mettur at vera hampuliga væl fyri, hóast gýtingarstovnurin er minkaður munandi síðani 2005. Veiðutrýstið eftir upsa er tó framvegis ov høgt.

Yvirskipað mælir Havstovan til, at ein umsitingarætlan verður gjørd, sum m.a. ásetur hvørji tiltøk skulu setast í verk, tá gýtingarstovnurin minkar niður um ávísa stødd, so gýtingarstovnarnir kunnu koma fyri seg aftur.

Samanfatandi mælti Havstovan til, at parkera óbrúktar fiskidagar hjá skipabólkum, sum serliga veiða tosk og hýsu. Harumframt mælir Havstovan til at skerja dagatalið hjá bólkunum 3, 4 og 5 við 30 % av teimum brúktu døgunum, sum liður í einari ætlan at stilla veiðitrýstið rætt. Eisini verður mælt til at dagatalið hjá bólki 2, sum serliga fiskar upsa, verður skert við 10%. Harumframt mælir Havstovan til at brúka aðrar reguleringar fyri at geva smáfiski betri møguleikar at vaksa seg inn í fiskiskapin.

Samanumtikið mugu vit ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu eru vánalig, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðinøgdin av toski og hýsu undir Føroyum ikki verður størri í 2014 í mun til 2013.

Upsastovnurin verður sagdur at vera hampuliga væl fyri, men higartil í 2014 hevur upsafiskiskapurin verið á sama lutfalsliga lága støði sum í 2013.

# Virksemi felagsins í farna ári

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum av teimum málum, sum hetta seinasta árið hava myndað virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Á aðalfundinum í 2013 stóðu Regin Mikkelsen, Fríðin Ziskason og Ludvík við Stein fyri vali. Regin Mikkelsen og Fríðin Ziskason vórðu afturvaldir, meðan Ludvík við Stein ikki stillaði upp aftur. Fyri hann var Jens Pauli Petersen valdur í nevndina. Seinni skipaði nevndin seg við Regin Mikkelsen sum formanni og Jógvan Gregersen sum næstformanni.

## Marknaðara tgongd

Tað er ein sannroynd, at tá tað snýr seg um marknaðaratgongd til marknaðir uttanfyri ES, eru karmarnir fyri fiskavirkini og fiskaútflytarar bert lítið broyttir ella betraðir hesi seinnu nógvu árini. Heldur er tað við tíðini vorðið torførari at útflyta føroyskar fiskavørur til marknaðir uttanfyri ES. Hetta hevur viðført, at okkara kappingarneytar í grannalondunum nú hava munandi betri treytir at útflyta fiskavørur til marknaðirnar uttanfyri ES í mun til tær treytir, sum føroyskir fiskaútflytarar hava. Hetta bæði tá tað snýr seg um handilsavtalur/toll, og tá tað snýr seg um tær Heilsufrøðiligu avtalur, sum eru neyðugar fyri yvirhøvur at sleppa at útflyta til hesar marknaðir. Nógvir áhugaverdir marknaðir eru tí í veruleikanum stongdir fyri føroyskar fiskavørur, antin tí føroyskir myndugleikar ikki hava Heilsufrøðiliga avtalu við landið, ella tí at tollurin er so nógv hægri enn hjá okkara kappingarneytum, at tað í veruleikanum er vónleyst hjá føroyskum útflytarum at kappast.

Felagið hevur nú í eina tíð roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku uppá at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd á nýggjum vakstrarmarknaðum, serliga í Suðuramerika og í Asia. Hetta er ikki eitt arbeiði, sum verður liðugt eftir einum ári. Serliga hjá einum lítlum landi sum Føroyar, krevur tað eitt áhaldandi arbeiði frá myndugleikunum at sannføra myndugleikarnar í einum landi um at nýta orku uppá handils- og heilsufrøðiligar avtalur við Føroyar. Royndirnar vísa, at tað tekur langa tíð at lata upp marknaðirnar fyri føroyskar fiskavørur. Tað er tí ov seint at taka samband við myndugleikarnar í hesum londum, tá trupulleikar eru á ES-marknaðinum. Tað er neyðugt at arbeiða við at opna so nógvar av teimum áhugaverdu marknaðunum fyri føroyskar fiskavørur, so tað ber til at selja onnur støð, tá umstøðurnar á einum marknaði gerast truplar.

Landið setur tó ikki nógva orku av til at gera handilssáttmálar og til at fáa í lag heilsufrøðiligar avtalur.

Eftir áheitan frá felagnum lat Løgtingið í 2013 Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eina játtan á 500 tús. kr., sum skuldi nýtast til at fáa marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur á nýggjum marknaðum, herundir Brasil. Staðfestast má tó, at lítið kom burturúr hesum peningi í so máta.

Útlfutningsforum er sett á stovn, har umboð fyri Løgmansskrivstovuna, Vinnumálaráðið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, og Ráfiskakeyparafelagið javnan hittast at viðgera spurningar í mun til útflutning, serliga uttanfyri ES. Men ein fortreyt fyri at nakað skal henda á hesum øki er, at myndugleikarnir raðfesta starvsfólkaorku at arbeiða við marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur. Annars verður tað sera torført at fáa nakað at henda á hesum øki.

## Avtøka av uppboðssølukravinum

Felagið hevur seinastu 2-3 árini í fleri umførum heitt á Fiskimálaráðið um at avtaka uppboðssølukravið fyri óvirkaðan fisk. Felagið hevur við hagtølum frá Hagstovu Føroya víst á, at uppboðssølukravið ikki tykist hava haft nakra ávirkan á nøgdina av óvirkaðum fiski sum fer av landinum, og at tað tí tykjast verða onnur viðurskifti enn lógarverkið, sum avgera, hvussu nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Samstundis skapar uppboðssølukravið eyka umsiting fyri ráfiskakeypararnar og tað almenna, eins og tað verður verri hjá ráfiskakeyparunum at samstarva við seljararnar um eitt nú verkætlanir at økja um góðskuna á rávøruni. Harumframt ger uppboðssølukravið tað oftani torført at fáa besta prísin á marknaðinum úti í heimi.

Fiskimálaráðið hevur í kunngerð fyribils strikað uppboðssølukravið fram til 1. September 2014. Um hetta skal halda fram aftaná 1. september, skal kunngerðin tískil broytast.

## Útflutningur av saltfiski til ES

Í farna ári samtykti ES-skipanini loksins uppskotið um at loyva fosfat í saltfiskaframleiðsluni til ES, hóast stóra mótstøðu úr Portugal. Tó at vísindaliga grundarlagið undir umsóknini var sera sannførandi, varð málið útsett ferð eftir ferð. Portugal royndi í seinastu løtu at fáa ásett serlig merkingarkrøv í uppskotið, men hetta vóru limalondini ímóti, tí hildið varð, at krøvini í vanligu merkingarkunngerðini vóru

nøktandi. Á heysti 2013 varð kunngerðin lýst, og frá 1. Januar 2014 kundu saltfiskaframleiðarar so aftur útflyta saltfisk sum vant.

Sera gott samstarv var millum Ráfiskakeyparafelagið og samstarvsfeløgum í Íslandi, Danmark og Noregi um hetta málið eins og við sendistovunarnar í Brussel.

## Samskipan av ESE

Løgmansskrivstovan boðaði í juli 2013 frá, at hon ikki ætlaði at samskipa føroyska landabásin á fiskivinnumessuni í Brussel í 2014. Hetta var stutt áðrenn tilmeldingarfreistin til messuna var úti. Ráfiskakeyparafelagið átók sær tí saman við øðrum feløgum í húsinum at samskipa messuluttøkuna í 2014. Orsakað av stutta skotbránum varð avgjørt, at Føroya Arbeiðsgevarafelag formliga skuldi standa fyri básinum í 2014. Avtala varð gjørd við Uttanríkisráðið um stuðul á 600 tús. kr. til messuluttøkuna í 2014. Eingin avtala er gjørd um 2015.

Gerð av básinum varð bjóðað út, og sáttmáli varð gjørdur við Sansir um hetta.

Um feløgini í Vinnuhúsinum framvegis skulu samskipa tiltakið í komandi árum, verður helst neyðugt at skipa hetta øðrvísi í 2015.

## Marknaðarføring av føroyskum fiski

Ráfiskakeyparafelagið fær javnan fyrispurningar frá fiskakeyparum kring heimin um at koma í samband við føroyskar fiskaútflytarar. Í miðal munnu tað vera 1-2 fyrispurningar um vikuna. Felagið sendir teimum síðani ein teldupost við kontaktupplýsingum til limirnar í felagnum, so teir kunnu seta seg beinleiðis í samband við fyritøkurnar.

Lutfalsliga høga talið av fyrispurningum er helst ein ábending um, at tað ikki er so lætt at finna føroyskar fiskaútflytarar á netinum. Í øllum førum er einki samlað yvirlit á enskum máli. Arbeitt hevur tí verið við at fyrireika eina heimasíðu sum skal lýsa føroyskan fisk og har áhugaðir keyparar kunnu fáa eitt yvirlit yvir føroyskar fiskaútflytarar. Hetta kundi verið eitt fyrsta stig í at gera føroyskar útflytarar meira sjónligar on-line. Neyðugt er tó við fígging, um verkætlanin skal gerast veruleiki.

## Mál í Fiskivinnuráðnum

Felagið hevur í farna ári gjørt sína ávirkan galdandi gjøgnum sína luttøku í Fiskivinnuráðnum. Millum tey mál, sum eru viðgjørd, eru m.a. makrelfiskiskapurin, broytingar í ymiskum kunngerðum, og ymiskar broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

**Mál í Løgtinginum**

Tá mál eru fyri í Løgtinginum, sum hava týdning fyri limirnar, fær felagið oftast málini til ummælis, og felagið verður eisini biðið um at møta á nevndarfundum í sambandi við viðgerð av málunum.

# Skjal 1: Fiskavøruútflutningur í 2012 og 2013

Útflutningsvirði er gjørt upp í FOB=Free On Board

Kelda: Hagstova Føroya

| | Virði í 1.000 DKK | | | Nøgd í tonsum | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2012 | 2013 | Munur | 2012 | 2013 | Munur |
| Állur | 46 | 0 | -46 | 1 | 0 | -1 |
| Annar fiskur, i.a.n. | 203.652 | 311.652 | 108.001 | 13.046 | 30.472 | 17.426 |
| Annar flundrufiskur, i.a.n. | 2.294 | 937 | -1.357 | 65 | 43 | -22 |
| Annar ídnaðarfiskur, i.a.n. | 6.553 | 2.410 | -4.143 | 749 | 319 | -429 |
| Blálonga | 13.634 | 11.563 | -2.071 | 854 | 576 | -278 |
| **Brosma** | **55.744** | **40.651** | **-15.093** | **2.016** | **1.692** | **-324** |
| Búrfiskur | 1.977 | 10 | -1.967 | 108 | 1 | -107 |
| Glashvoysa | 9 | 19 | 10 | 0 | 0 | 0 |
| **Gullaksur** | **96.227** | **84.442** | -11.785 | **8.348** | **7.934** | -414 |
| Havtaska | 37.901 | 16.547 | -21.354 | 689 | 347 | -342 |
| Hávur | 4.206 | 1.622 | -2.584 | 379 | 151 | -228 |
| Hummari | 6.903 | 7.278 | 375 | 47 | 42 | -5 |
| Hvítingsbróður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hvítingur | 10.874 | 5.524 | -5.350 | 435 | 257 | -178 |
| **Hýsa** | **62.280** | **68.145** | **5.865** | **3.355** | **3.555** | **200** |
| Høgguslokkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Jákupsskel | 31.104 | 29.241 | -1863 | 1.398 | 1.324 | -74 |
| Kalvi | 10.213 | 7.937 | -2276 | 184 | 158 | -27 |
| Kikarafiskur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kongafiskur | 37.370 | 39.393 | 2023 | 1.708 | 2.286 | 578 |
| Krabbi | 3.766 | 1.019 | -2747 | 106 | 33 | -74 |
| Kræklingur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Laksur | 1.821.459 | 2.456.409 | 634950 | 59.063 | 58.911 | -152 |
| Langasporl | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Livur | 1.793 | 674 | -1119 | 89 | 50 | -39 |
| Lodna | 34.540 | 61.968 | 27429 | 17.704 | 17.501 | -203 |
| **Longa** | **127.587** | **10.634** | **-116953** | **4.358** | **3.824** | **-534** |
| Lýsi | 5.057 | 113.164 | 108107 | 2.324 | 16.082 | 13.758 |
| Lýsingur | 13.053 | 12.775 | -278 | 3.180 | 3.860 | 680 |
| Makrelur | 826.751 | 803.997 | -22754 | 95.312 | 91.774 | -3.538 |
| Nebbasild | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Onnur skeljadjór o.l. i.a.n. | 707 | 77 | -630 | 4.485 | 0 | -4.485 |
| Reyðsprøka | 6.010 | 2.213 | -3797 | 262 | 146 | -116 |
| Rogn | 391 | 0 | -391 | 27 | 0 | -27 |
| Rækjur | 102.076 | 62.222 | -39854 | 5.351 | 2.932 | -2.419 |
| Sardin | 2.961 | 0 | -2961 | 251 | 0 | -251 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 195 | 2.585 | 2390 | 26 | 91 | 65 |
| Sild | 324.578 | 409.059 | 84481 | 43.895 | 63.530 | 19.634 |
| Skrubba | 0 | 8 | 8 | 0 | 5 | 5 |
| Skøta | 3.228 | 2.708 | -520 | 220 | 211 | -9 |
| Slógv | 21.365 | 34.109 | 12.744 | 16.632 | 17.402 | 769 |
| Steinbítur | 3.852 | 3.409 | -443 | 176 | 136 | -40 |
| Stinglaksur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Svartkalvi | 97.069 | 98.169 | 1.100 | 3.027 | 3.244 | 217 |
| Svartkjaftur | 160.461 | 133.307 | -27.154 | 37.099 | 32.759 | -4.340 |
| **Toskur** | **451.813** | **516.047** | **64.235** | **12.994** | **16.108** | **3.115** |
| Tunfiskur | 80 | 0 | -80 | 17 | 0 | -17 |
| Tunga | 3.297 | 2.672 | -625 | 113 | 99 | -14 |
| **Upsi** | **419.170** | **330.642** | **-88.528** | **16.208** | **14.662** | **-1.545** |
| Tilsamans | 5.012.245 | 5.780.953 | 768.708 | 356.298 | 392.513 | 36.215 |